Tórshavn, tann 28. juni 2019
J.Nr.: LUM-29- 18/00117-32
(at tilskila í svari)

# Álit

viðvíkjandi klagu um vantandi heimild at steingja dagstovnar vegna ráðleggingardagar

Við skrivi, dagfest 21. november 2018, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "**Klaga um vantandi heimild hjá Tórhavnar kommunu at stongja dagstovnar gerandisdagar vegna ráðleggingardagar.**
>
> Sum foreldur at børnum á dagstovni í Tórshavnar kommunu skal eg hervið klaga praksis hjá Tórshavnar kommunu við at stongja dagstovnar gerandisdagar í dagtímunum vegna ráðleggingardagar. Undirritaði spurdi seg fyri hjá kommununi tann 31. okt. 2018 við avriti til Løgtingsins umboðsmann, og svarið frá kommununi tann 20. nov. 2018 var, at skipanin við ráðleggingardøgum hevur verið siðvenja, síðani dagstovnaøkið bleiv yvirtikið.
>
> Øvugt at kommununi meti eg, at dagstovnar í Tórshavnar kommuna hava skyldu til at taka ímóti innskrivaðu børnunum allar gerandisdagar í dagtímunum, og at foreldur sambært § 3, stk. 2 í dagstovnalógini og avtalu við kommununa um ansing hava eitt rættarkrav upp á hesa tænastu, ið goldið verður fyri. Harumframt meti eg, at kommunan ikki hevur heimild til at stongja sínar dagstovnar í gerandisdøgum í sambandi við ráðleggingardagar.
>
> Trivnaðarstjórin í Tórshavnar kommunu, B, vil vera við í viðhefta skrivi til undirritaða, at eingin lógaráseting í dagstovnalógini ella kunngerðum við heimild í hesi lóg, sigur nakað um ráðleggingardagar. Til hetta skal sagt vera frá, at eg ikki meti, at kommunan skal hava positiva heimild til at skipa fyri ráðleggingardøgum, men eg meti, at kommunan ikki hevur heimild til at stongja dagstovnar gerandisdagar í dagtímunum vegna ráðleggingardagar, tí talan er fyri tað fyrsta um eitt inntriv í rættin hjá foreldrum til ansing sambært avtalu, og harnæst kann vísast á § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, ið sigur nakað um atgongdina til tænastuna gerandisdagar í dagtímunum.
>
> Trivnaðarstjórin vísir á, at tað er ein siðvenja við ráðleggingardøgum, síðani kommunurnar yvirtóku dagstovnaøkið. Upplýsast skal í hesum sambandi, at dagstovnaøkið bleiv yvirtikið í ár 2000. Víðari vísir trivnaðarstjórin í Tórshavnar kommunu á, at tað í reglum frá mentanarnevndini í býráðnum eru ásett krøv til dagstovnarnar viðvíkjandi

ráðleggingardøgum m.a., at foreldur skulu fáa fráboðan um hetta í seinasti lagi 6 vikur áðrenn, at ráðleggingardagur er, so tey kunnu skipa seg. Viðmerkjast skal, at ein samtykt frá mentanarnevndini í Tórshavnar kommunu viðv. fráboðan í sambandi við ráðleggingardagar kann neyvan brúkast sum heimildargrundarlag hjá kommununi til at stongja dagstovnarnar vanligar gerandisdagar, tá ið lógin ásetur, at dagstovnar hava opið gerandisdagar í dagtímunum. Harumframt verður ikki mett, at ein siðvenja hjá kommununi síðani 2000 er nøktandi sum heimildargrundarlag. Hetta verður grundað á, at siðvenjan ikki samsvarar við § 3, stk. 2 í dagstovnalógini. Harumframt er tíðarkarmurin alt ov stuttur til at statuera eina rættarsiðvenju, ið kann víkja frá lógini og rættarkravinum hjá foreldrum sambært lóg og avtalu...

...

Harumframt ber til hjá kommununi at skipa ráðleggingardagarnar øðrvísi, soleiðis at tað ikki gerst neyðugt at stongja dagstovnin í gerandisdøgum, og sostatt er praksis hjá kommununi allarhelst eisini í ósamsvar við fyrisitingarrættarliga proportionalitetsprinsippið. Í hesum sambandi kundi møgulig samskipan/samstarv við aðrar dagstovnar í kommununi komið upp á tal, har t.d. ein partur av starvsfólkunum er hjá børnunum ella onnur líknandi loysn. Júst hvørja loysn kommunan velur, skal eg ikki gera meg klókan uppá.

Kommunan er stór, so har burdi verið møguleikar fyri at leggja virksemið í sambandi við ráðleggingardagar soleiðis til rættis, at ansingarmøguleikarnir í gerandisdøgunum ikki blivu heilt avskornir. Upplýsast skal, at tað hjá nógvum foreldrum kann vera ein avbjóðing í mun til eitt nú arbeiði, tá ið dagstovnur stongir summar gerandisdagar í árinum. Fleiri mugu tí væntast at brúka feriu o.a., soleiðis at tey kunna vera hjá børnunum.

Av tí at talan er um klagu viðv. praksis hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við tilrættislegging av ráðleggingardøgum við at stongja dagstovnar í gerandisdøgum, verður ikki mett, at talan er um kæru um eina fyrisitingarliga avgerð, ið kann kærast til Mentamálaráðið sambært § 11, stk. 1 í dagstovnalógini, og tískil verður málið klagað beinleiðis til Løgtingsins umboðsmann.

Vísandi til omanfyri standandi verður ført fram, at praksis hjá kommununi við at stongja dagstovnar gerandisdagar í dagtímunum er í ósamsvar við § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, og at har ikki er nøkur siðvenja, ið kann legitimera eitt frávik frá lógini og harvið gera inntriv í rættarkravið hjá foreldrum uppá ansing allar gerandisdagar í dagtímunum sambært lóg og avtalu.

...”

## Málsgongd

Tann 31. oktober 2018 sendi A Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

“Kann Tórshavnar kommuna greiða mær frá, hvar kommunan hevur heimild til at stongja dagstovnar í kommununi vegna sokallaðar ráðleggingardagar, samstundis sum foreldur rinda fyri ansing hvønn gerandisdag í mánaðinum og sostatt hava eitt rættarkrav uppá hesa tænastu frá kommununi? Av tí at fleiri foreldur kunnu hugsast at hava tørv á ansing hvønn dag vegna

arbeiði, er tílík kommunal venja harumframt tyngjandi fyri borgaran, og tað stillar vanliga greið krøv til heimildargrundarlagið.

...”

Tann 20. november 2018 svaraði Tórshavnar kommuna A soleiðis:

“...

Tær ivaleyst kunnugt er eingin beinleiðis lógaráseting í dagstovnalógini ella kunngerðum við heimild í dagstovnalógini um ráðleggingardagar.

Eg viðfesti her málslýsing og mentamálanevndarsamtykt frá fyrr í ár um skipan av ráðleggingardøgum á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu.

Har er greitt frá siðvenjuni við ráðleggingardøgum, síðan dagstovnaøkið varð kommunalt. Harumframt er í reglunum ásett krøv til stovnarnar hesum viðvíkjandi, m.a., at foreldur skulu fáa fráboðan um ráðleggingardag í ársætlanini og í seinasta lagi 6 vikur, áðrenn ráðleggingardagur er, hetta til tess at foreldur fáa kunning bæði um endamál við ráðleggingini og í góðari tíð kunnu skipa seg í mun til sjálvan ráðleggingardagin, tá stovnurin ikki hevur opið.”

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 22. november 2018, varð klagan send Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Tórshavnar kommuna biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 12. desember 2018 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

“**Viðvíkjandi klagu frá A um ráðleggingardagar**

Víst verður til skriv umboðsmansins, dagfest 22. november 2018, har Tórshavnar kommuna verður biðin um at lata umboðsmanninum eina frágreiðing um viðgerðina av hesum máli. Kommunan verður eisini biðin um at lata til láns øll skjøl viðvíkjandi málinum umframt skjalayvirlit.

- Viðvíkjandi viðgerðini av fyrispurningi frá A, dagfest 31. oktober 2018 til kommununa, um heimild at stongja kommunalar dagstovnar vegna ráðleggingardagar ...:

Undirritaði svaraði hesum í tposti 20. november 2018 saman við viðfestum gerðabókaravriti av viðgerðini í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs um skipan við ráðleggingardøgum á dagstovnaøkinum, har greitt er frá siðvenjuni við ráðleggingardøgum aftur til, at økið gjørdist kommunalt, og hvørji atlit verða tikin til foreldrini viðvíkjandi kunning í góðari tíð v.m.

Kommunan upplýsti í hesum sambandi eisini, at eingin beinleiðis lógar- ella kunngerðarheimild er í dagstovnalógini um ráðleggingardagar.

Hesi skjøl eru hjáløgd.

- Viðvíkjandi viðgerðini í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs av skipan av ráðleggingardøgum á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu ...:

Júst tí, at einki formligt grundarlag hevur verið um ráðleggingardagar, hvørki tá um skipan, innihald ella annað viðvíkur, men at hetta bygdi á siðvenju, varð mál reist í mentamálanevndini til tess at staðfesta nakrar yvirskipaðar reglur um skipan við ráðleggingardøgum fyri dagstovnaøkið í kommununi

Henda viðgerð og krøv annars til ráðleggingardagar framgongur av omanfyri nevnda avriti úr gerðabókini.

Um eitthvørt er ógreitt ella tørvur er á fleiri upplýsingum, veitir kommunan fegin tað."

Hjáløgdu skjølini við málslýsing og mentamálanevndarsamtykt frá 7. mars 2018 vóru soljóðandi:

"...

**Skipan við ráðleggingardøgum á dagstovnaøkinum**

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Ráðleggingardagar á dagstovnaøkinum eru fyrisitingini kunnugt ikki formliga skipaðir nakrastaðni, men hava verið fyriskipaðir í øllum førum aftur til 2001.

Siðvenjan er, at dagstovnar 0-6 ár (barnagarðar/vøggustovur) hava tveir ráðleggingardagar um árið ...

Stovnurin er vanliga stongdur, tá ráðleggingardagur er.

Ásannast má ávísur tørvur á slíkum ráðleggingardøgum. Hetta er høvið, har starvsfólk kunnu savnast til neyðuga fakliga menning og ráðlegging av ymsum slag eisini tí, at tað er vanliga stór útskifting av starvsfólki, og at stórur partur av teimum eru ófaklærd.

Ongar beinleiðis reglur ella krøv eru frá kommununi um ráðleggingardagarnar annars. Mett verður, at tørvur er á slíkum, so at samanhangur er millum politisku skipanina, fyrisitingina og stovnarnar um endamál og skipan annars viðvíkjandi ráðleggingardøgum.

...

Í skákskrift niðanfyri síggjast tær broytingar, sum fyrisitingin mælir til verða gjørdar eisini samsvarandi viðmerkingum frá hoyringini.

**Skipan viðvíkjandi ráðleggingardøgum**

2. Ráðleggingardagar - almenn krøv

- Allir kommunalir dagstovnar og frítíðarskúlar í Tórshavnar kommunu kunnu hava upp til 2 ráðleggingardagar um árið - í mesta lagi ein um várið og í mesta lagi ein um heystið.

- Í sambandi við ráðleggingardag kann stovnurin verður stongdur. Tað ber ikki til at leggja dagarnar saman soleiðis, at stovnurin er stongdur í tveir fylgjandi dagar.

- Stovnsleiðarin hevur ábyrgdina av ráðleggingardøgunum og skipar dagarnar við skrá og innihaldi fyri allan dagin. Starvsfólk hava møtiskyldu *8 tímar svarandi til ein arbeiðsdag fulla tíð.*

- Stovnsleiðarin skal boða barna- og ungdómsdeildin frá, nær ráðleggingardagarnir verða hildnir, *tvs. dagfesting og klokkutíðir.* Stovnsleiðarin skal eisini upplýsa, hvat er sett á skrá fyri dagin umframt grundgeving fyri skránni.

- Ráðleggingardagar skulu í mest møguligan mun leggjast í tíðarskeiðum, har tað er til minst ampa fyri foreldrini, eitt nú dagin fyri halgidag/frídag, beint undan ella eftir vikuskifti ella í tíðarskeiðum, tá vanliga ikki so nógv børn eru á stovninum.

- Barna- og ungdómsdeildin tilskilar sær rætt til at skipa annan ráðleggingardagin hjá einum, fleiri ella øllum dagstovnunum í sambandi við serlig átøk ella felags menningarætlanir hjá kommununi. Barna- og ungdómsdeildin boðar frá hesum í góðari tíð*, í minsta lagi 4 mðr. áðrenn.*

- Foreldur skulu fáa fráboðan um ráðleggingardag í ársætlanini og í seinasta lagi 6 vikur áðrenn ráðleggingardagur er. Eisini skulu foreldur fáa kunning um innihaldið og endamálið við ítøkiliga ráðleggingardegnum.

...”

Við skrivi, dagfest 17. desember 2018, vórðu viðmerkingarnar hjá Tórshavnar kommunu sendar A til ummælis við einari freist til 10. januar 2019.

Samstundis sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu nakrar útgreinandi spurningar. Umboðsmaðurin ynskti at vita, um Tórshavnar kommuna hevði umhugsað at bjóða teimum børnum, sum hava tørv á ansing, tá stovnur teirra hevur ráðleggingardag, aðra ansing í staðin hendan dag. Eisini ynskti umboðsmaðurin at vita, um foreldur fáa avsláttur í foreldragjaldinum í sambandi við ráðleggingardagar. Biðið varð um, at Tórshavnar kommuna svaraði umboðsmanninum innan 14. januar 2019.

Tann 20. desember 2018 boðaði A umboðsmanninum frá, at viðmerkingarnar frá Tórshavnar kommunu ikki góvu orsøk til fleiri viðmerkingar frá honum.

Tann 22. januar 2019 sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu eina áminning og bað kommununa um at svara útgreinandi spurningunum beinanvegin.

Tann 25. januar 2019 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi svar:

"...

1) Spurt verður, um Tórshavnar kommuna hevur umhugsað at bjóða teimum børnum, sum hava tørv á ansing, tá stovnur teirra hevur ráðleggingardag, aðra ansing henda dag

Til hetta er at siga, at tó at tað ikki framgongur í skrivligu málslýsingini til mentamálanevndina, sum send er umboðsmanninum áður, so hevur hetta verið umrøtt. Tórshavnar kommuna hevur ikki tøkan stovn at taka til, tá ein ella fleiri stovnar hava ráðleggingardag, tað ber fysiskt ikki til.

Tórshavnar kommuna bjóðar millum jóla og nýggjár og 3 vikur um summarið tað, sum rópt verður samanlagt virksemi. Hetta merkir, at til ber hjá foreldrum at fáa ansing til barnið á einum stovni í kommununi, sum hevur opið í feriuni. Royndirnar eru, at sera fá børn melda til, har tað tey síðstu árini ikki hevur verið neyðugt at hava opið um jólini, og um summarið hevur bert ein lítil stovnur havt opið.

Hetta kann sjálvandi ikki samanberast við ráðleggingardagar. Munurin er, at millum jól og nýggjár og um summarið er dagstovnavirksemið í allari kommununi niðurlagað, og tí ber til at bjóða aðra ansing.

Tá skipað verður fyri samanlagdum virksemi, so trívast ikki øll børn í nýggjum umhvørvi og við starvsfólkum, tey ikki kenna. Hetta hevur kommunan bøtt við, at hvør stovnur letur starvsfólk til stovnin, sum hevur samanlagda virksemið, um so er, at teirra stovnur hevur eitt barn tilmeldað. Hetta verður gjørt við atliti at tryggleikan og trivnaðin hjá barninum.

Hetta letur seg tó heldur ikki gera í sambandi við ráðleggingardagar, hvørs endamál er, at øll starvsfólk á stovninum taka lut, tí ráðleggingin fevnir um virksemið hjá øllum starvsfólkunum á stovninum. Endamálið við ráðleggingardøgum er tá burtur, um nøkur starvsfólk skulu fylgja børnum til samanlagt virksemi, um hetta var alternativt ansingartilboð slíkan dag - og tá bert til nøkur heilt fá, tí til ber ikki at flyta børn í stovnar ella stovur, har fult er frammanundan, so sum støðan er í dag.

2) Spurt verður síðani, um foreldur fáa avsláttur í foreldragjaldinum í sambandi við ráðleggingardagar.

Nei, kommunan veitir ikki avsláttur í sambandi við ráðleggingardagar ítøkiliga. Umboðsmanninum til upplýsingar, so er foreldragjaldið pr. dag pr. barn í vøggustovu kr. 124,47, um støðið verður tikið í 260 yrkadøgum um árið. Fyri eitt barnagarðspláss vildi talan verið um kr. 76,87 um dagin pr. barn. Kommunan veitir tó ein generellan avsláttur í foreldragjaldinum við tað, at foreldragjaldið er 27% av rakstrarútreiðslunum, har lógin annars gevur heimild til 30%.

Um okkurt er ógreitt, ella tørvur er á fleiri upplýsingum, veitir kommunan fegin teir."

Tann 4. februar 2019 varð svarið hjá Tórshavnar kommunu sent A til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Við skrivi, dagfest 6. februar 2019, sendi A umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "Vísandi til mál ... skal eg vísa til svar frá Tórshavnar kommunu, dagfest 25. jan. 2018, at tað er ivasamt, at trivnaðarstjórin, B, at gera sær eina egnu meting av møguleikanum at bjóða børnum aðra ansing í sbv. ráðleggingardagar. Serliga er tað ivasamt, tá ið hesin týðandi tátturin ikki framgongur av skrivligu málslýsingini hjá mentanarnevndini. Hetta er nokk ikki nakað, sum trivnaðarstjórin sjálvur kann viðgera, ella sum kann viðgerast á munnligum grundarlagi.
>
> Løgliga skal eg vísa á rættarkravið, ið ásett er í § 3, stk. 2 í dagstovnalógini, at dagstovnar hava opið í gerandisdøgunum. Eingin heimild tykist tí vera fyri at stongja hesar. Lógin heimilar bert, at dagstovnar kunnu hava opið longri enn bert í dagtímunum. Harumframt tekur avtalugrundarlagið millum kommunu og foreldur ikki nakað fyrivarni fyri ráðleggingardøgum, og tí er tað ábyrgdin hjá kommununi at finna alternativa loysn, so foreldur hava møguleikar fyri ansing hvønn gerandisdag í árinum. Hóast danska dagstovnalógin er øðrvísi enn tann føroyska, so er ein líknandi áseting í donsku dagtilbudsloven § 23, stk. 2, ið ásetur:
>
> *"Stk. 2.* Kommunalbestyrelsen skal på alle **hverdage** med undtagelse af den 5. juni og den 24. december tilbyde forældre pasningsgaranti i dagtilbud efter § 19, stk. 2-4, eller § 21, stk. 2 og 3."
>
> Í viðmerking til ásetingina stendur (mín **áherðsla**):
>
> "Lukkedage i nogle af kommunens dagtilbud er generelt set ikke et brud på pasningsgarantien, **hvis kommunalbestyrelsen stiller et alternativt pasningstilbud til rådighed**, jf. veil 2015 9109. Lukkedage bør dog begrænses til et rimeligt niveau og placeres på dage, hvor der erfaringsvist kun er få børn i dagtilbuddene, ligesom kommunen med fordel kan forsøge at sikre, at forældre og børn kender til de gæsteinstitutioner, som bliver stillet til rådighed ved lukkedage. Kommunalbestyrelsen har ikke pligt til at stille alternativ pasning til rådighed for forældrene ved lukning **juleaftensdag** og **Grundlovsdag**."
>
> Undir pkt. 194 í vegleiðing 2015 9109 stendur:
>
> "**194. Lukkedage** defineres som hverdage, hvor et dagtilbud holder helt eller delvist lukket. Med hverdage menes alle dage undtagen lørdage, søndage og helligdage samt den 5. juni (Grundlovsdag) og den 24. december (Juleaftensdag).
>
> Der er også tale om **lukkedage**, hvis der f.eks. afholdes **pædagogiske dage for hele personalet**, eller der foregår andre aktiviteter, som betyder, at et barn ikke kan passes i den institution eller enhed/afdeling, som barnet er optaget i, og barnet derfor henvises til **alternativ pasning**, pasning i venskabsinstitution eller lignende.
>
> Kommunalbestyrelsen har for børn mellem 26 uger og indtil skolestart som følge af forsyningsforpligtelsen og reglerne om pasningsgaranti **en forpligtelse til at stille en plads i et dagtilbud til rådighed på alle hverdage**. Holder et dagtilbud under kommunens forsyning en **lukkedag**, skal kommunen derfor stille et altemativt dagtilbud efter dagtilbudsloven til rådighed for barnet. Kommunen kan derfor kun undlade at stille alternativ

pasning til rådighed, når dagtilbuddet holder lukket i weekender, på helligdage samt den 5. juni (Grundlovsdag) og den 24. december (Juleaftensdag), da dette ikke defineres som **lukkedage**.

En eventuel brug af **lukkedage** og tilrettelæggelsen af den alternative pasning skal ske under hensyn til dagtilbudslovens formålsbestemmelse. Kommunalbestyrelsen skal derfor sikre, at også det alternative pasningstilbud lever op til dagtilbudslovens formålsbestemmelser - herunder tilgodeser børnenes behov for stabile og trygge rammer i deres dagtilbud og familiemes muligheder for at få deres hverdag til at hænge sammen."

Hetta vísir greitt, at talan er um eitt rættarkrav uppá ansing, og at kommunan tí hevur skyldu til at veita foreldrum alternativar loysnir, tá ið ráðleggingardagar verða hildnir."

Við skrivi, dagfest 8. februar 2019, vórðu viðmerkingarnar hjá A sendar Tórshavnar kommunu til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Umboðsmaðurin frætti ikki aftur frá Tórshavnar kommunu. Tann 6. mars 2019 boðaði umboðsmaðurin tí pørtunum frá, at hann fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Í sambandi við viðgerðina bað umboðsmaðurin, tann 6. juni 2019, Tórshavnar kommunu um at senda sær viðtøkurnar fyri dagstovnin D og upplýsa, hvør hevði góðkent viðtøkurnar.

Tann 12. juni 2019 sendi Tórshavnar kommuna umboðsmanninum soljóðandi teldupost:

"Vísi til áheitanina niðanfyri um viðtøkur fyri stovnin D.

Fyrst er at siga, at tað eru ikki *viðtøkur* fyri dagstovnavirkseminum og einki krav er um tað í dagstovnalógini.

Hinvegin eru viðtøkur fyri virksemið hjá foreldraráðnum samsvarandi dagstovnalógini § 9. Í hesum viðtøkum er einki ásett um ráðleggingardagar.

Stovnurin D er eisini býlingshús. Ein reglugerð er fyri eigarafeløg ásetir reglur um, hvussu eigarafelag kann brúka býlingshúsið. Henda reglugerð fevnir ikki um dagstovnavirksemið ella ráðleggingardagar.

Stovnurin D hevur á heimasíðuni kunningarfaldara til foreldrini, sí hetta leinkið: ... Á s. ... undir yvirskriftini serstakir dagar stendur upplýst: **"Ráðleggingardagur: Tveir dagar um árið hevur stovnurin ráðleggingardag, og tá er stovnurin stongdur."**

Kunningin er í samsvari við reglugerðina fyri ráðleggingardagar.

Men kunnu tit møguliga nágreina, hvat biðið verður um viðvíkjandi viðtøkum fyri dagstovnin D?"

Tann 13. juni 2019 sendi umboðsmaðurin Tórshavnar kommunu soljóðandi teldupost:

> "... Í teldupostinum verður spurt, um umboðsmaðurin møguliga kann nágreina, hvat biðið verður um viðvíkjandi viðtøkum fyri dagstovnin D.
>
> Umboðsmaðurin skal vísa á kunngerð nr. 62 frá 1. apríl 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung. Í § 3 í hesi kunngerð er ásett, at dagstovnar skulu hava viðtøkur, ið eru góðkendar av Føroya landsstýri. Sambært § 3, stk. 2 nr. 5 í kunngerðini skulu nærri reglur verða ásettar í viðtøkunum viðvíkjandi hvør, ið hevur heimild at avgera upplatingartíð og annað viðvíkjandi dagliga rakstrinum av stovninum."

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um vantandi heimild hjá Tórshavnar kommunu at steingja dagstovnar gerandisdagar í dagtímunum í sambandi við ráðleggingardagar hjá starvsfólkunum. Klagarin metir, at foreldur hava eitt rættarkrav um ansing, ið goldið verður fyri, allar gerandisdagar sambært lóg og avtalu.

Tórshavnar kommuna vísir á, at einki formligt grundarlag hevur verið um ráðleggingardagar. Siðvenjan er, at dagstovnar hava tveir ráðleggingardagar um árið, og at stovnurin vanliga er stongdur, tá ráðleggingardagur er. Mentamálanevnd Tórshavnar býráðs samtykti, tann 7. mars 2018, reglugerð fyri dagstovnaøkið, sum staðfestir nakrar yvirskipaðar reglur um skipan við ráðleggingardøgum fyri dagstovnaøkið í kommununi.

*Rættarkrav um ansing allar gerandisdagar*
Í § 3, stk. 1 í dagstovnalógini er ásett:

> "**§ 3**. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. ..."

Sambært viðmerkingunum til lógina hevur kommunan ábyrgdina av dagstovnaøkinum í kommununi, men hevur ikki skyldu til at bjóða øllum børnum í kommununi stovnspláss.

Í § 3, stk. 2 í dagstovnalógini er ásett:

> "*Stk. 2.* Dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at dagstovnar kunnu hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum."

Sambært viðmerkingunum til lógina hava dagstovnar vanliga opið í dagtímunum hvønn gerandisdag, men møguleiki skal vera hjá einum dagstovni og eini dagrøkt at hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum.

Pláss á dagstovni er eitt tilboð, sum kommunan bjóðar borgarum sínum, og sum borgarar kunnu taka av og gjalda ein part av kostnaðinum fyri. Eftir orðaljóðinum í § 3, stk. 2 er ætlanin, at dagstovnar hava opið hvønn gerandisdag. Dagstovnalógin ásetur tó ikki, at dagstovnar *skulu* (mín undirstriking) hava opið hvønn gerandisdag. Lógin allýsir heldur ikki ein gerandisdag, og um ávísir dagar, sum t.d. jólaaftan og ólavsøkuaftan, ikki eru at meta sum gerandisdagar.

Eg meti tí ikki, at kommunan hevur skyldu at veita trygd fyri, at kommunan hevur ansingarpláss til taks til innskrivaðu børnini allar gerandisdagar í árinum, sum t.d. í sambandi við ráðleggingardagar.

*Heimild*
Tórshavnar kommuna vísir á, at eingin beinleiðis lógar- ella kunngerðarheimild er í dagstovnalógini um ráðleggingardagar, hvørki tá um skipan, innihald ella annað viðvíkur. Tí hevur mentamálanevnd Tórshavnar býráðs samtykt reglugerð, sum staðfestir nakrar yvirskipaðar reglur um skipan við ráðleggingardøgum fyri dagstovnaøkið í kommununi.

Dagstovnalógin skipar dagstovnaøkið og kom í gildi tann 1. juli 2000. Dagstovnalógin hoyrir til málsøkið hjá Mentamálaráðnum.

Í § 3, stk. 3 í dagstovnalógini er ásett:

> "*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um námsfrøðiliga stevnumiðið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum."

Í viðmerkingunum til lógina verður mett, at tað er rættast, at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur á økinum, og ikki kommunan, soleiðis at tilboðið til barnið verður tað sama í øllum landinum. Í reglunum skal m.a. standa, at dagstovnar skulu hava reglugerðir.

Áðrenn 1. juli 2000 var dagstovnaøkið fevnt av lov for Færøerne om børneforsorg. Henda lóg varð sett úr gildi tann 1. januar 2006 við barnaverndarlógini (løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 93 frá 6. juni 2017). Sambært viðmerkingunum til § 78 í barnaverndarlógini verður kunngerð nr. 62 frá 1. apríl 1993 um dagstovnar, dagrøkt og døgnstovnar fyri børn og ung í gildi, til hon verður avloyst av reglum sambært barnaverndarlógini ella sett úr gildi. Hetta er, so vítt eg dugi at síggja, ikki hent, og kunngerðin er tí enn galdandi.

Í § 3, stk. 1 í kunngerðini er ásett:

> "**§ 3**. Dagstovnar skulu hava viðtøkur, ið eru góðkendar av Føroya landsstýri.
>
> *Stk. 2.* Í viðtøkunum skal standa navn, heimstaður og endamál stovnsins. Eisini skal í viðtøkunum verða ásettar nærri reglur viðvíkjandi:
>
> ...
>
> 5) hvør, ið hevur heimild at avgera upplatingartíð og annað viðvíkjandi dagliga rakstrinum av stovninum,
>
> ..."

Vísandi til omanfyri standandi meti eg, at heimildin viðvíkjandi reglum um virksemið hjá dagstovnum, millum annað nær teir hava opið, liggur hjá landsstýrismanninum. So vítt eg dugi at síggja, hevur landsstýrismaðurin onga kunngerð gjørt hesum viðvíkjandi, har m.a. støða verður tikin til, um dagstovnar skulu hava opið í sambandi við ráðleggingardagar hjá starvsfólkunum.

Eg fari at mæla til, at Mentamálaráðið fær greiði á hesum viðurskiftum og letur meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Burtursæð frá omanfyri standandi viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Løgtingsins umboðsmaður